# Bara superstudentar sleppa víðari

**Nú, meiri enn nakrantíð áður, ræður um at hava eitt gott miðnámsskúlaprógv. Tey, sum vilja lesa víðari, skulu helst vera super-studentar fyri at sleppa inn, tí miðaltølini fyri at sleppa inn eru methøg. Tað er greitt, nú plássini til hægri lærustovnarnar eru sett.**

Eydna Skaale

Í fleiri ár hevur talið av umsóknum til hægri lærustovnarnar vaksið støðugt, og aftur í ár er met sett. Hægri lærustovnarnir hava í ár fingið umsóknir frá 68.564 umsøkjarum, og nú er greitt, at ein stórur partur av hesum ikki sleppa inn á tað, tey søktu.

Av tí, at talið av umsøkjarum er so høgt, so trýstir tað miðaltalið, sum krevst fyri at sleppa inn, í topp. Tað er nevniliga soleiðis, at tað eru útboð og eftirspurningur, sum gera av, hvussu høgt kravda miðaltalið skal vera. Jú færri plássini eru, og jú fleiri umsóknirnar eru – jú hægri verður kravda miðaltalið.

### Nøkur leys pláss eftir enn

Enn eru nakrir føroyingar, sum ikki hava fingið svar frá háskúlanum, teir hava søkt inn á.

Men um tú ert ein av teimum, ið hevur fingið noktandi svar og ikki sleppur inn á dreymaútbúgvingina, so eru allar súðir ikki syftar enn.

Til ber nevniliga at søkja, har pláss framvegis eru eftir. Allir teir høgu lærustovnarnir hava ein lista, har til ber at síggja tey plássini, sum framvegis eru leys at søkja. So um tú veruliga ætlar at byrja lesturin nú, so er at bera skjótt at og søkja, áðrenn eisini tey plássini rúka.

*eydna@sosialurin.fo*



*Savnsmynd*

### Her eru tær 20 útbúgvingarnar, sum krevja hægst miðaltal á lærdu háskúlunum í Danmark. Miðaltalið er roknað eftir danska 7-talsstiganum.

1. Humanistisk basisstudium + journalistik + annað fak, Roskilde Universitet 10,9
2. Læknavísindi, Keypmannahavns Universitet 10,8
3. International Business, Handelsháskúlin i Keypmannahavn 10,8
4. Statsvísindi/Samfelagsfak, Keypmannahavns Universitet 10,7
5. Samfundsvísindaligt basisstudium + journalistik, Roskilde Universitet 10,7
6. Antropologi, Keypmannahavns Universitet 10,6
7. Jarðamóðir, København N, Professionsháskúlin Metropol, University College 10,6
8. Molekylær biomedicin, Københavns Universitet 10,5
9. Film- og mediuvísindi, Keypmannahavns Universitet 10,5
10. Sálarfrøði, Keypmannahavns Universitet 10,5
11. Retorik, Keypmannahavns Universitet 10,4
12. International Business and Politics, Handilsháskúlin í Keypmannahavn 10,3
13. Veterinærmedicin, Keypmannahavns Universitet 10,1
14. Læknavísindi, Aarhus Universitet 10,1
15. Litteraturvísindi, Keypmannahavns Universitet 10
16. Læknavísindi, Syddansk Universitet 10
17. Jarðamóðir, Aalborg Øst Professionshøjskolen University College Nordjylland 9,9
18. Sosiologi, Keypmannahavns Universitet 9,8
19. Sálarfrøði, Aarhus Universitet 9,8
20. Læknavísindi, Aalborg Universitet 9,8

## Nógvar umsóknir – fá pláss

### Hesar eru tær útbúgvingarnar, sum hava flestar umsøkjarar í mun til tal av plássum, og sum sostatt eru serliga torførar at koma inn á.

| | Pláss: | Umsóknir: |
|---|---|---|
| Fotojournalist, Journalistháskúlin | 16 | 149 |
| Grafisk kommunikatión, Mediuháskúlin | 59 | 416 |
| Sniðgevi, Danmarks Designskúli | 105 | 731 |
| Hum. basisstudium + journalistik + annað fak, Roskilde Universitet | 25 | 156 |
| Portugisiskt, Keypmannahavns Universitet | 3 | 17 |
| Film- og mediuvísindi, Keypmannahavns Universitet | 98 | 454 |
| Sjónvarps- og mediutilrættislegging, Medieháskúlin | 37 | 164 |
| Jarðamóðir, Professionsháskúlin Metropol | 69 | 291 |
| Sálarfrøði, Keypmannahavns Universitet | 229 | 906 |
| Læknavísindi, Keypmannahavns Universitet | 555 | 2023 |
| Samf. basisstudium + journalistik, Roskilde Universitet | 25 | 91 |
| International Business, Handilsháskúlin í Keypmannahavn | 130 | 453 |
| Sniðgevi, Designskolen Kolding | 79 | 274 |
| Odontologi (tannlækni), Keypmannahavns Universitet | 99 | 342 |
| Psykologi, Syddansk Universitet | 110 | 359 |
| Ítrótt, Aarhus Universitet | 50 | 163 |
| Antropologi, Keypmannahavns Universitet | 102 | 327 |
| Læknavísindi, Aalborg Universitet | 57 | 182 |
| Ítrótt, Keypmannahavns Universitet | 105 | 334 |
| Journalist, Århus N, Journalisthøjskolen | 252 | 766 |